# m hevði eg doyð

mentur at gera meiri enn, hvat eg dugi at skilja, sigur Fríði.

## 200 tons eftir átta døgum

Hesin minniligi fríggjadagurin byrjaði annars sum allir aðrir. Klokkan er farin nakað av sjey, og Fríði hevur fingið sær ein góðan blund eftir eina harða vakt frammanundan.

Teir liggja á góðari fiskileið, Røstbankanum út fyri Lofoten, og fiskiskapurin hevur verið rættiliga góður: 200 tons av upsa eftir 8 døgum, er ikki at forsmáa!

Fríði verður purraður út, fer í klæðini og inn í messuni og fær sær ein bita. Tað er ójavnt, hvussu er við práti í messuni og hvørji evni verða tikin upp eina slíka løtu.

Í morgun er helst lítil ivi um, hvat evnið er: Ringa veðrið, fyri ikki at siga illveðrið á bankanum. Kring Atlantic Star leikar hann í av megi - útnyrðingur, einar 20 metrar um sekundið. Sum um tað ikki var nóg mikið, so er aldan eisini sera høg, einar 8 metrar.

Ein heitur drekkamunnur er góður, men tíð er ikki at verða sitandi. Vaktin byrjar um lítla løtu, og Fríði fer frá borði at gera seg kláran til dagsins gerning.

Tá hann løtu seinni er klárur til arbeiðið sítt á verksmiðjuni, grunar hann ikki, at tað skal standa um lív hjá honum minni enn fýra tímar seinni.

## Eitt stríð við deyðan

Klokkan er stundisliga 8, tá Fríði byrjar arbeiðið sítt við kryvjiborðið. Tað er týðiligt at merkja, at skipið er óróligt í sjónum – tað høggur í og klamsar so niðuraftur. Fyri ein royndan sjómann er hetta lítið at tosa heim um.

Tríggjar tímar seinni skilst á lagnum at teir skulu rigga til at fáa trolið umborð aftur um eina lítla løtu. Hesum arbeiði luttekur Fríði eisini í.

Umframt arbeiðið sítt á sjálvari verksmiðjuni, er hann ein av teimum kønu, tá trolið verður hálað og kastað út aftur. Hetta arbeiðið hevur hann gjørt mangar ferðir. Allar hinar ferðirnar varð hetta arbeiðið gjørt, uttan at hann ella nakar annar av manningini hugsaði stórvegis um hvat og hvussu.

Men henda fríggjadagin 19. november 2004 varð alt øðrvísi. Hesa løtuna gloyma hvørki Fríði ella nakar annar av manningini ongatíð. Um teir ikki høvdu roynt tað áður, so vórðu teir nú vitni til, at ein av teirra egnu stríddist við deyðan – og vann á honum!

## Tann vissi deyðin

Nú er klárt at hála trolið innanborða. Saman við Fríða fara tríggir aðrir upp á dekkið. Klokkan er júst farin av hálvgum tólv.

Var veðrið sjaskut, tá teir skaffaðu fyrri um morgunin, er tað ikki vorðið betri nú. Teir merkja, hvussu trolarin framvegis livir í sjónum: Gronin verður lyft upp í loft og hann gerst tungur afturi á hekkuni.

– Jú, veðrið var sera vánaligt. Eingin ivi um tað, men vit hava kortini fiskað í verri veðri enn hetta, greiðir Fríði frá.

Teir á dekkinum fáa veiðuna til høldar, hóast arbeiðslíkindini ikki eru av teimum bestu í ringa veðrinum. Einki er at bíða við, og nú verður gjørt klárt at fáa trolið út aftur. Fiskiskapurin er góður, og tað ræður um at fylla skipið, so menn sleppa heima aftur til síni kæru á jólum.

Klokkan er farin av nærkast middegi, og enn hevur alt gingið eftir ætlan. Nú skal trolið út aftur, og her eigur Fríði sítt fasta pláss og sína føstu uppgávu.

Um fáar minuttir verður hann drigin við trolinum út í kalda havið – og undir vanligum umstøðum tann vissa deyða!

Klokkan er júst farin av middegi og nú kemur róp í um at gera klárt at kasta út aftur. Tveir minuttir seinni stendur alt stilt fyri menninar á dekkinum, hóast stormurin leikar í rundan um teir: Ein teirra stríðist fyri lívinum!

## Drigin móti havinum

Hetta hálið hevði verið eitt av teimum góðu, og tað ræður tí um at skunda sær at fáa trolið út aftur.

Teir leggja nú til merkis, at ein sensor á trolinum – eitt sonevnt troleyga – má skiftast út. Hetta verður gjørt eftir lítlari løtu, og nú er stundin so komin.

Fríði er inni í bananum, har trolið skal renna. Hann stendur á bellinum (tí lætta og leysa partinum av trolinum) við rygginum til hekkuna, og veit einki um, at hann um fá sekund skal síggja deyðan í eyguni.

Í einum sekundi fær trolarin ein skvamp frammanfyri. Gronin lyftist upp móti vindinum, og førir hetta samstundis við sær at hekkan fer so mikið langt niður, at dekkið fyltist við sjógvi.

– Eg stóð soleiðis, at eg hevði ongan møguleika at síggja sjógvin sum kom inn á dekkið. Onkur rópti at eitt brot kom, men alt hendi bara so skjótt, at eingin fekk stundir at reagera.

– Tað var sum trolarin var í leysari luft, og eg merkti bara, at føturnar verða skræddar undan mær, og at eg spakuliga verði drigin móti hekkuni – og havinum, sigur Fríði álvarsamur.

Tað ringasta var kortini tað, at hann gjørdist fastur í trolinum, og hevði ongan møguleika at ríva seg leysan.

## Púrasta í sjokk

Teir á dekkinum eru greiðir yvir, at her stendur ikki væl til. At støðan er sera álvarsom.

Fríði er sjálvur greiður yvir, at nú er tað ein spurningur um lív ella deyð. At her mugu góð ráð og hepni fylgjast at, um hann skal koma aftur til síni kæru – damuna, familjuna og ikki minst 10 mánaðar gomlu dóttrina.

Hóast støðan er sera álvarsom, nær hann kortini at fáa eygnasamband við ein av manningini sum stóð við sliskuna, samstundis sum bellurin so líðandi nærkast havinum.

– Eg sá álvarsama bragdið í andliti hansara. Allir væntaðu bara tað ringasta, og eingin fekk gjørt nakað fyri at bjarga mær, tí alt hendi so skjótt.

– Teir høvdu nóg mikið við bara at halda sær á fótum í illveðrinum. Teir stóðu har pinnastívir, tigandi og vóru púrasta í sjokk, samstundis sum trolið rann út í kalda sjógvin og við mær hangandi føstum í, sigur Fríði.

Hann steðgar á eina løtu og sigur so: – Tað eru slíkar løtur, ið ein sær hvussu stórt tað er at liva!

## Ein evigheit í 20 minuttir

Ringt er at greiða frá teimum næstu minuttunum, meðan Fríði berjist fyri lívinum í kalda sjónum á Røstbankanum út fyri Lofoten.

Alt gekk so skjótt fyri seg, samstundis sum tíðin nærum var uppsteðgað fyri Fríða, her hann liggur at kalla hjálparleysur á víðopnum havi, fastur í trolinum – og sera langt frá bjargingini umborð á trolaranum.

– Eg havi ikki ánilsi um, hvussu leingi alt hetta vardi. Onkur segði fimm minuttir og onkur annar helt 20 minuttir. Líka veit eg, men fyri mær tóktist tað sum ein evigheit, sigur hann.

Í øllum førum er greitt, at tað sum hendir hesa løtuna er slíkt sum sjáldan endar gott. Talið á teimum sjómonnunum sum hava sligið út og eru vorðnir bjargaðir, man vera nærum á null!

Liggjandi í sjónum fær Fríði eyga á ljóskastarin frá trolaranum, og hann sær eisini menninar sum standa har og hyggja út í hav. Hann heldur seg hoyra teir rópa eitthvørt, men hann skilir ikki eitt orð av tí teir rópa. Tey hvørva í vindinum og aldubrotunum.

Ringt var at halda eyguni vend móti trolaranum, tí rundan um hann brúsa aldurnar, vindurin leikar í og hann liggur tungt í sjónum í vátu klæðunum. Teir hava bundið fyri gummistyvlarnar soleiðis at sjógvur ikki skal koma niður í teir.

Nú er hetta ein beinleiðis orsøk til at tyngja Fríða enn meiri í stríði sínum fyri lívinum.

– Eg veit ikki, hvat ein hugsar eina slíka løtu. Í allari rokanini hugsaði eg um tað hægra valdið. Hvar

*Framhald á næstu síðu*




*Fríði var við Atlantic Star eitt ár aftrat eftir hendingina á Røstbanken. Nú hava vit júst havt minningardag teirra sjólátnu, og tað vísir seg at tað hendir altíð okkurt álvarsligt beint undan ella beint eftir hesum degi, sigur Fríði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

*"Eg slapp við lívinum, men tað gjørdi teir ikki. Eg skilji tað ikki enn, men hvat – vit skulu helst ikki skilja alt"*

*"Prosentvísi møguleikin at sleppa við lívinum, tá ein soleiðis verður slongdur fyri borð, er nærum null"*

*"Hann dugir ikki til fulnar at siga hvussu og hvaðani hann fekk megina til tað, men við vinstru hond síni fekk hann á einhvønn hátt fatur á úthálaranum og varð hangandi"*